# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Leingið flogvøllin nú

Flogvallarmálið man vera eitt tað málið í Føroyum, sum oftast hevur verið viðgjørt í almenninginum og millum politikarar. Við jøvnum millumbili verður spurningurin um útbygging av verandi flogvøll og bygging av einum heilt nýggjum flogvølli settur á breddan. Kanningar verða gjørdar, og orðadrátturin eftir tær er bæði harður og drúgvur. Fyri síðani at doyggja aftur – til antin onkur óheppin flúgving hevur verið ella spurningurin um at menna ferðavinnuna við betri flogvølli og at skapa umstøður fyri loftflutningi av okkara fiskavørum er frammi í orðaskiftinum.

Fremst av øllum kemur trygdin hjá ferðafólki. Tað eru øll samd um. Síðani er tað spurningurin um fíggjarliga orku. Men tað er so eisini spurningur um raðfesting,  hvat er skilabest her og nú og so uppá longri sikt.

Føroyar eru eitt lítið samfelag, og tí vil tað altíð vera spurt, um orka er til at hava tveir flogvøllir. Flogvøllurin í Vágum var bygdur í krígstíð og varð hann ikki bygdur til vanliga ferðafólkaflúgving. Men hann er so útbygdur síðani til at kunna taka sær av ferðafólkaflutningi. Eina tíðina snúði kjakið seg um, at tað var so óhøgligt at skula fara um Vestmannasund. Tað líkasum setti gongd á kjakið um at fáa ein nýggjan flogvøll, sum lá meira sentralt, eitt nú á Glyvursnesi. Men onnur góð ráð vóru til at taka. Undirsjóvartunnilin gjørdist veruleiki, og tá fekk pípan annað ljóð. Nú var tað ikki flutningurin til og frá vøllinum sum var nakar trupulleiki.

Bygging av nýggjum flogvølli aðrastaðni í landinum fer at taka mong ár. Her mugu nógv fleiri kanningar gerast, og so er tað eisini ein peningaligur spurningur. Hetta fær fleiri at seta spurningin, um ein útbygging av verandi vølli skal steðgast. Í okkara verð er neyðugt at útbyggja vøllin í Vágum vegna trygdina. Tí má henda ikki steðgast nú men fara í gongd skjótast.

Hin spurningurin um ein nýggjan vøll, sum liggur meira sentralt og sum kann skapa umstøður fyri eitt nú útflutningi av okkara dýru fiskavørum, eigur samtíðis at vera tikin framaftur. Løgtingið eigur skjótast at seta út í kortið eina langtíðarætlan, sum byrjar við kanningum av best hóskandi stað at leggja flogvøllin og síðani, hvussu hann kann fíggjast. Nú kenna vit ikki búskaparligu støðuna í landinum um 3-5 ella 10 ár. Tí er torført nú at seta nógvar pengar av, ikki minst nú eisini verður tosað um stórar tunnilsíløgur.

Enn vita vit ikki um oljan finst í rakstrarverdugum nøgdum í okkara undirgrund. Men oljufeløg eru sinnað at brúka milliardir av krónum fyri at finna út av hesum. Og hendir tað, at fund verða gjørd, hvat er sannlíkt, nú stór fund verða gjørd beint hinumegin markið, vildi tað so ikki verið eitt gott hugskot at brúkt framtíðar oljupengar til ein nýggjan flogvøll. Sjálvandi skal avgerðin um flogvøll ikki verða tengd at tí um olja finst ella ikki, men tað er so ein framtíðar møguleiki, sum vit kunnu hava við í samlaðu myndini. Útbyggið vøllin í Vágum og gerið kanningar av einum nýggjum eisini.

**Sosialurin**

## Støðan er ikki so, Bjørt



**HELGI ABRAHAMSEN**
Løgtingsmaður

"Tá hini reiða ból og vit bara gráta", er yvirskriftin á eini grein, sum Bjørt Samuelsen hevði í bløðunum í farnu viku. Hóast Bjørt leggur annan týdning í hesi orðini, so koma vit ikki uttanum, at tað eru mong, sum í hesum døgum hava grund til at gráta, tí politikarar hava sett fullveldismálið hægri enn tað bólið, sum hesum fólkum varð unt.

Inntøkur landskassans vóru við fríum vilja lækkaðar, og nú eru vit av álvara farin at merkja avleiðingarnar av hesum.

**Rakar meint, men munar lítið**

Bjørt sigur seg undrast á tær sparingar, sum landsstýrið hevur gjørt á almannaøkinum, tí sparingarnar muna nærum einki á stóra undirskotinum á fíggjarlógini. Men tað er júst tað, sum er tað syrgiliga. Gjørdu sparingarnar raka meint, men tær muna kortini so evarska lítið á eini fíggjarlóg, sum hevur næstan 800 mió. krónur í undirskoti. Har skal nógv meira til.

**Vaskar sínar hendur**

Bjørt roynir í greinini at venda trupulleikan yvir á tað, hon kallar "skattalættarnir hjá ABC". Men her haldi eg at hennara søguliga innlit svíkur, tí tað var nevniliga ikki ABC-samgongan sum var upprunin til skattalættarnar.

Tann 19. februar 2003 legði Karsten Hansen (táverandi tjóðveldismaður) uppskot fyri tingið um at lækka landsskattin í 2003 og 2004 við tilsamans 125 mió. krónum. Í viðmerkingunum til uppskotið sæst, at sjálvstýrislandsstýrið helt, at skattalættarnir fóru at vera eitt positivt íkast fyri samfelagsbúskapin.

Uppskotið varð eftir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina, har meirilutin (Óli Breckmann, Kristina Háfoss, Tórbjørn Jacobsen og Kári P. Højgaard) skrivaði soleiðis í álitinum: "*Hesin skattalættin er liður í einum langtíðar skattapolitikki, ið hevur til endamáls at lække skattin á arbeiði. Væntast skal tí í samsvari við samgonguskjalið ein framhaldandi minking í skattatrýstinum í 2005 og 2006.*"

Hetta vísir at Sjálvstýrislandsstýrið ætlaði at lækka skattin øll árini, meðan tey sótu, tí hetta skuldi vera gott fyri fólkið og landsins búskap. Men sjálvstýrissamgongan slitnaði í desember 2003, og tí bleiv tað ABC-samgongan, sum kom at standa fyri skattalættunum í 2005 og 2006.

**Veruligi trupulleikin**

Nú aftaná hava hesi somu fólkini eftir øllum at døma fingið eitt "forkláringsproblem", tí blokkniðurskurðurin, sum einki skuldi kosta tí vanliga føroyinginum, rakar sera hært í samfelagnum, og tí verður støðugt víst til "skattalættarnar hjá ABC". Tey vilja helst hava fólk at gloyma, at Sjálvstýrislandsstýrið var upprunin til skattalættarnar, og at blokkniðurskurðurin er tann stóri trupulleikin, sum bæði landskassi og Føroya fólk hava fingið at dragast við.

Tiltøk aftaná tiltøk verða sett í verk, men - sum Bjørt sigur tað so væl:  Tað munar so lítið.

## Amnesty International og Ísrael (2)



**SVENNING AV LOFTI**

Í blaðgrein fra Amnesty International Føroyadeild verður roynt at vísa aftur tað, ið ført varð fram í blaðgrein, at Amnesty International órættvíst leggur eftir Ísrael í spurninginum um vatn-nýtsluna í økinum.

Veruleikin er tann, at ísraelsku vatnmyndugleikarnir hava víst aftur ákæruna frá Amnesty International, sum varð kunngjørd 27. oktober, og sum førir fram, at ísraelar drekka seg ótystar av vatni, sum palestinar skuldu fingið. Vatnmyndugleikar Ísraels vísa øllum áskærum aftur og siga, at palestina-arabarar framvegis bróta Oslo-sáttmálan við at bora ólógliga eftir vatni og dálka náttúruna við óviðgjørdum avlopsvatni:

»Frágreiðingin frá Amnesty International er ikki røtt. Og tá er hetta sagt varliga«, hevur talmaður Ísraels, Uri Shore, boðað frá. Hóast ákæruna um, at Ísrael tekur burtur vatn frá tí sum nú er undir palestinskum myndugleikum, so er nøgdin av vatni, ið er til taks fyri palestinum síðani seks daga kríggið í 1967 í veruleikanum økt, meðan ísraelar hava mist 70% av vatngoymslum sínum. Vatn-myndugleikar Ísraels hava eisini sent út hesa fráboðan:

»Nøgdin av vatni, íroknað tær nøgdir, ið eru til taks undir jørð, tað vil siga, nøgdin av tí vatni, sum var atkomuligt hjá hvørjum einstøkum ísraelsfólki undan juni 1967 var 500 kubikk-litrar um árið. Í dag eru talið 149 kubikklitrar, meðan vatn til palestina-arabar í veruleikanum er økt við 22%. Frá 87 kubikk-litrum til 105 árliga til hvønn.«

Samstundis nýta palestina-arabarar ikki avlopsvatnið til landbúnaðin, soleiðis sum avrátt var í 1995 í Oslo-avtaluni. Gerald Steinberg professari sigur:

»Frágreiðingin frá Amnesty International snarar málið viðvíkjandi vatnspurninginum og kemur ikki inn á lógar- og søgugongdina, ið ikki er so einføld, fyri einaferð enn á rangan hátt at seta Ísrael fram sum eitt harðræðisstýri. Frágreiðingin verður borin fram á ein trongskygdan hátt, sum einans gevur Ísrael skyldina fyri alt, soleiðis at palestinska leiðslan verður fríkend fyri ábyrgd av avtaluni, ið varð undirskrivað í samband við Oslo-avtaluni.«

Amnesty International hevur gjørt mangt dygdararbeiði í farnum árum. Sjálvur var eg limur í hesum felagsskapi í mong ár. Men eg tók meg úr Amnesty International av fleiri orsøkum, m. a. vegna teirri margháttligu støðu, ið hesin felagsskapur hevur latið komið til sjóndar viðvíkjandi Ísrael. Vónandi ger onkur góð sál í felagsskapinum vart við hetta á røttum stað, so at broyting kemur í framyvir.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.